## 5. flokkur 2018/19

# Fyrisagnir at skriva til hesar dagar:

| | | | |
|---|---|---|---|
| **hósdag 29. november** | **fríggjadag 30. november** | **mánadag 3. desember** | **hósdag 6. desember** |
| "Hví helt hann, at eg hevði tikið seðilin?"spyr Ólavur "Tað var eg, sum tók hann," sigur Teitur og tekur seðilin upp úr lummanum. | "Tú lýgur," sigur Ólavur. "Hví segði tú einki? Hann mundi dripið meg. Hvat skalt tú brúka nummarið hjá mammu hansara til?" | "Hetta er ikki nummarið hjá mammuni," sigur Teitur. "Eg sat og eygleiddi hasar menninar. Teir vóru ósamdir um okkurt." | Teitur slættar seðilin. Á honum standa tvey røð av tølum. "Hetta eru telefon-nummur," sigur Ólavur. "Tú hevur stolið nummurini hjá mammu hansara. |
| **fríggjadag 7. desember** | **mánadag 10. desember** | **hósdag 13. desember** | **fríggjadag 14. desember** |
| Doyð, tú dugir væl." "Frata," sigur Teitur. Hann hyggur eftir manninum, men hann er horvin. Teitur rukkar seðilin saman og tveitir hann frá sær. | "Hey, bíða eitt sindur," sigur Ólavur. "Har eru eisini nakrir bókstavir á honum." Hann tekur seðilin upp og slættar hann. | "Hatta er bara navnið á mammuni," sigur Teitur. "Nei, hygg," sigur Ólavur. "Her eru tvey nummur. Við hvørt teirra stendur ein bókstavur ... | ... Soleiðis skrivar tú ikki nummur ella nøvn. Ein krossur er eisini." "Hatta er bara okkurt klór, sum hann hevur gjørt," sigur Teitur. |
| **mánadag 7. januar** | **hósdag 10. januar** | **fríggjadag 11. januar** | **mánadag 14. januar** |
| "Hatta hevur einki at siga." Teitur stingur seðilin í lumman. "Um eg hitti hann aftur, gevi eg honum seðilin." | Tá ið Teitur kemur heim, tekur hann seðilin upp úr lummanum og kannar hann aftur. Tølini líkjast ikki telefon-numrum. | Oman fyri summi er eitt lítið null. Tað verður brúkt, tá ið tú skrivar stig. Hetta er yvirhøvur ikki telefon-nummur. | Men hvat eru tey so? Niðast er ein krossur skrivaður og bókstavirnir N og H. Hetta líkist onkrum, tú gert, tá ið tú keðir teg. |
| **hósdag 17. januar** | **fríggjadag 18. januar** | **mánadag 21. januar** | **hósdag 24. januar** |
| Menninir sóu ikki út til at keða seg. Men tað kann vera, at hetta er ein gamal seðil, sum teir hava skrivað á. | Teitur leggur seðilin frá sær. Í somu løtu gongur hurðin, og systirin kemur brestandi inn. | "Kann eg læna teldilin hjá tær?" spyr Sigrið. Hon hyggur at seðlinum, sum liggur á borðinum. "Hví hevur tú skrivað krosstøl?" | "Hvat roksar tú um," sigur Teitur illur á málinum. Sigrið skal altíð blanda seg uppí. |
| **fríggjadag 25. januar** | **mánadag 26. januar** | **hósdag 27. januar** | **fríggjadag 28. januar** |
| "Hasi tølini," sigur hon og setir fremstafingur á seðilin. "Hatta eru tvey krosstøl. Eru tey ikki tað?" | "Jú, og hvat um tað?" Teitur roynir at látast sum einki. Hvussu ber tað til, at hon sá tað beinanvegin? | "Orsaka, "sigur Sigrið. "Eg spurdi bara. Tú hevur kanska fjalt ein skatt har?" Tá ið Sigrið er farin, hyggur Teitur aftur at seðlinum. | Hon hevur rætt. Tølini líkjast teimum, pápin hevur á GPS'aranum. Har eru bæði tøl og bókstavir. Hví sá hann tað ikki sjálvur? |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **mánadag<br>28. januar** | **hósdag<br>31. januar** | **fríggjadag<br>1. februar** | **mánadag<br>2. februar** |
| Kanska var tað tí, at maðurin segði, at tað vóru telefon-nummur. Tað er okkurt løgið við hasum báðum monnunum.<br>Hann ringir til Ólav. | "Hygga síggj," sigur Ólavur, tá ið Teitur hevur sagt honum frá tí, sum Sigrið hevur sagt. "Vit læna GPS'aran hjá pápa tínum og finna staðið ... | ... Har liggur kanska ein sekkur fullur av pengum og bíðar eftir, at vit finna hann." Ólavur flennir og sløkkir telefonina. | Løtu seinni er Ólavur har. Teitur fer eftir GPS'aranum hjá pápanum. Hann skrivar bæði krosstølini. Eina lítla løtu seinni vísir pílurin leiðina. |
| **mánadag<br>4. februar** | **hósdag<br>7. februar** | **fríggjadag<br>8. februar** | **mánadag<br>11. februar** |
| Teir tveita seg upp á súkklurnar og fara tann vegin, sum pílurin vísir. Man tað vera her í býnum ella langt av leið? | Teir súkkla fram við havnini. Síðan fram við kirkjuni. Tað eru fleiri kirkjur í býnum, men hendan er tann største. | Hendan kirkjan er stór sum ein dómkirkja og stendur á hægsta staði í býnum við útsýni yvir fjørðin. | Teir stríða seg niðaná og steðga við portrið. Uttanfyri standa bara nakrir fáir bilar. Tíbetur. So kunnu teir leita ósæddir. |
| **hósdag<br>14. februar** | **fríggjadag<br>15. februar** | **mánadag<br>18. februar** | **hósdag<br>21. februar** |
| Teir seta súkklurnar frá sær. Pílurin vísir beint á hurðina inn í kirkjuna.<br>"Vit verða noyddir at fara inn í kirkjuna," sigur Ólavur. | "Kunnu vit fara inn?" spyr Ólavur<br>"Ja, sjálvandi," sigur Teitur. "Øll kunnu fara inn í kirkjuna."<br>Hann letur hurðina upp. | Teir koma inn í forkirkjuna og fara inn í sjálva kirkjuna. Uppi undir loftinum eru stór vindeygu við litaðum glasmyndum. | "Heldur tú, at tað er her?" spyr Ólavur.<br>"Ja, eg rokni við tí," svarar Teitur.<br>Hann heldur GPS'aran upp og fylgir pílinum. |
| **fríggjadag<br>22. februar** | **mánadag<br>25. februar** | **hósdag<br>28. februar** | **fríggjadag<br>1. mars** |
| Hann flytur seg og vísir á prædikastólin.<br>Men áðrenn teir koma til prædikastólin, vísir pílurin eina aðra leið. | Teir troka seg inn ímillum nakrar stólar. Pílurin vísir á altartalvuna.<br>Men áðrenn teir koma fram til hana, verður skíggin svartur. | "Frata," sigur Ólavur. "Eg helt, at vit høvdu funnið staðið."<br>Teitur ristir GPS'aran.<br>"Hann er sloknaður," sigur hann. | "Múrarnir eru ov tjúkkir. Sambandið við fylgi-sveinin slitnar. Eg rokni við, at tað er her onkrastaðni nær við. Skulu vit ikki leita?" |
| **hósdag<br>7. mars** | **fríggjadag<br>8. mars** | **mánadag<br>11. mars** | **hósdag<br>14. mars** |
| Teitur fer niðan til altartalvuna. Har eru bara einglar og aðrar myndir. Aftanfyri er heldur einki. Ikki ein stórur sekkur av pengum, sum hann hevði væntað. | Ólavur fer ígjøgnum eina tvørgongd út í eitt annað rúm, sum er við kirkjuna. Hann stígur varisliga á stóru steinarnar á gólvinum. | Steinarnir eru slitnir av mongu fótafetunum, sum gjøgnum nógvu árini eru farin eftir teimum. Á summum síggjast enn nøvn og árstøl. | Í rúminum standa stórar kistur.<br>Teitur heldur GPS'aran upp ímóti hválvinum at vita, um tað ber til at fáa samband við fylgi-sveinin. |